

## Ligan størri týdning

Miðvallarspælarin Frank Lampard vil gera alt fyri, at Chelsea í ár aftur kann gerast enskur meistari í fótbólti, og Lampard viðurkennir, at í hansara verð hevur heimliga kappingin størri týdning enn eitt nú Champions League. – Eg fari við vissu at vinna Champions League einaferð, men fyri meg tað í landskappingini, at vit skulu aftur á toppin, sum vit vóru fyri nøkrum árum síðani, sigur Frank Lampard. Seinastu trý kappingarárini hevur Manchester United vunnið enska meistaraheitið.

# TB meinar tað

**Stig fyri stig hava TB-kvinnurnar etið seg upp eftir stigatalvuni, og eftir at tær um vikuskiftið vunnu á Mjølnir, ivast eingin longur í, at tær meira tað í fullum álvara**




Hilmar Jan Hansen

Í Eik-liguni hjá kvinnum er kappingin í trimum. Fyrst og fremst gongur oddaliðið, SÍ, fyri seg langt á odda, og síðani kemur stóri miðjubólkurin, har bæði TB, Mjølnir, Fleyr og Dráttur halda seg framat í kappingini um seinna finaluplássið, og so eru tað ÍF og KÍF, ið stríðast í botninum.

Myndin hevur verið støðug nokk so leingi, men kortini er merkisvert, at av teimum liðunum, ið bjóða SÍ av, tykist TB í løtuni vera tað, ið skal takast í størst álvara. Fyri ikki so langari tíð síðani vóru tvørakvinnur ikki so frægt sum millum liðini í miðbólkinum, so her hevur verið ein ótrúlig framgongd.

Kortini er sera javnt millum hesi fýra liðini, so enn er einki avgjørt. Hinvegin líktist tað hálvavegna einari avgerð í botnstríðnum, at ÍF vann á KÍF og nú er fýra stig frammanfyri. Tað verður tungt hjá unga liðnum úr Kollafirði at hála innaftur, men enn er kappingin tó ikki liðug. Verri enn so…




TB vann týðandi útidystin ímóti Mjølnir, og tí eru tvørakvinnur í løtuni tær, ið eru tættastar við at koma í FM-finalurnar ímóti SÍ

Savnsmynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

### Mjølnir-TB 2-3

(13-25, 25-23, 19-25, 25-18, 8-15)

Hetta var avgjørt mest áhugaverdi dysturin hetta umfarið, tí vinnarin í hesum dysti slapp at tryggja sær annaðplássið. Talan gjørdist eisini um ein javnan og spennandi dyst leygardagin, har TB og Mjølnir skiftust um at vinna tey bæði fyrstu settini, so støðan gjørdist 2-2.

Men í altavgerandi fimta settinum streyk TB avstað beinanvegin. Mjølnir kom ongantíð í nánd av at hótta, tá tað veruliga ráddi um, og við bara trimum rotatiónum í hesum síðsta settinum tók TB sigurin.

Samstundis var hetta ein staðfesting av, at TB ikki av tilvild er endað heilt har frammi. Liðið er stórt sæð tað sama, sum í fjør lá í botninum, men kortini hevur talan verið um styrk, eitt nú við spælandi venjaranum, Gudrid Nolsøe, umframt at aðrar eru byrjaðar aftur – seinast Marina Popovic, sum í gjár var við fyri fyrstu ferð í ár.

### SÍ-Dráttur 3-0

(25-18, 25-8, 25-22)

Grannauppgerðirnar í Vágum eru dystir, ilt er at spáa um frammanundan, men hesa ferð gjørdist eingin ivi um sigurin hjá SÍ. Oddaliðið spældi øgiliga væl í fyrsta setti, og hóast tølini síggja uppaftur meira sannførandi út fyri annað sett, so vóru tað heldur góðar servur hjá SÍ og vánaligar móttøkur hjá Drátti, ið avgjørdu tað.

Í triðja setti gjørdi Dráttur ein vørr og kom á odda 8-1 við góðum servum frá Maju Popovic. Men spakuliga nærkaðist SÍ, og mitt í settinum var javnleikur, 13-13. Nú var tað Helga Guttesen, ið kundi koma við nøkrum góðum servum fyri SÍ, men tað var ikki einsamalt nóg mikið til at sleppa av við Drátt, sum í triðja settinum fylgdi SÍ til dyrnar.

SÍ er framvegis seks stig framman fyri nummar tvey, so oddasessurin er líka tryggur, sum hann hevur verið tað leingi. Dráttur misti tvey stig hesa ferð, men er framvegis við, har tað er stuttligt, tí bara fýra stig eru millum nummar tvey og nummar fimm.

### ÍF-KÍF 3-1

(25-22, 25-23, 24-26, 25-13)

Á Kambsdali stóð nógv upp á spæl, tí hetta var ein uppgerð millum tey bæði niðastu liðini. Tað gjørdist eisini ein spennandi og javnur dystur, har KÍF fyri aðru ferð í vetur megnaði at vinna eitt sett, umframt at ungu kvinnurnar úr Kollafirði vóru væl við í teimum báðum fyrstu settunum.

Kortini vóru tað ÍF-kvinnunar, sum høvdu munin, og her komu ikki minst royndirnar teimum til góðar. Eisini mundi koma væl við, at hevarin, Barbara á Líðarenda, sum hevur sitið uttanfyri við skaða, var við aftur.

Sigurin merkir fyri ÍF, at fýra stig nú eru niður til KÍF, sum tó má fáa rós fyri stór framstig gjøgnum kappingarárið higartil. Kvinnurnar hjá KÍF eru ungar og óroyndar, men serliga í síðstuni hevur tað sæð út, sum tær veruliga hava lært nakað, hóast tær enn eiga fyrsta sigurin til góðar.